## Fiesta við 3 hurðum



Nýggi Fiesta, ið kom á marknaðin við 5 hurðum fyrr í ár, fæst nú eisini við 3 hurðum. Bilarnir líkjast heilt nógv, tó eru smærri designbroytingar og viðførisrúmið er nakað minni

*Kelda: Bil Magasinet*

## Gomul dekk til pulvur



Á árliga fundinum hjá norðurlendska dekkfelagskapinum STRO kom fram, at í Danmark eru teir komnir heilt langt við innsavningini av gomlum dekkum, ið verða gjørd til pulvur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Honda Accord



Nýggjur Honda Accord til evropeiska marknaðin verður á Paris Motorshow í hesum mánaðinum. Amerikanska útgávan av Accord er longu sýnd fram í USA. Munurin á útgávunum er bæði designið og motorarnir

*Kelda: Bil Magasinet*

# Luktbólkurin hjá Audi – tey seta nøsina í alt



*Teir ymsu lutirnir verða kannaðir í niðursjóðingargløsum, sum verða hitaði upp til 80 stig Celsius*



*Luktkvaliteturin verður kannaður áðrenn bilarnir fara av samlibandinum*



*Heldur ikki rattið sleppur undan at verða kannað*

**Tað er altíð nakað serligt við at fáa ein nýggjan bil. Tað sum man ikki fær við í prísinum, tá man keypir ein brúktan bil, er tann heilt serligi lukturin innan, sum er í øllum nýggjum bilum. Á Audi verksmiðjuni gera tey nógv burturúr luktinum**

LUKTURIN
*Magnus Gunnarsson*

Tey seta nøsina í alt - tað er ein partur av arbeiðinum hjá luktbólkinum á Audi veksmiðjuni. Tey eru alla tíðina uppá vakt, soleiðis at ongin ringur luktur sleppur framat, tað kunnu vera plastiklutir sum ofta hava ein serligan lukt, leðrið kann lukta av fiskaolju ella at gólvmátturnar lukta av leyki. Tað sama er galdandi fyri tilfar sum kann útskilja heilsuskaðilig evnir í bilinum. Umleið 500 ymiskir komponentar í kabinuni á Audi bilunum vera kannaðir av tí sera fíntfølandi mátitólinum, sum nøsin er. Uppgávan hjá luktbólkinum er at syrgja fyri, at Audi bilarnir hava ein eyðkendan góðan lukt.

### Lukturin av nýggjum bili

Endamálið við hesum kravmikla testprogramminum er at fáa ein diskretan góðan lukt í bilin. Allir lutirnir í einum Audi skulu hava ein góðan og neutralan lukt. Soleiðis fáa bilarnir tann eyðkenda luktin sum altíð er í nýggjum bilum, sum tey flestu seta stóran prís uppá. Møguleiki er sjálvandi fyri at geva bilinum ein heilt ávísan lukt, sum t.d. av blómum ella líknandi, men tað verður ikki gjørt. Tað ber snøkt sagt ikki til at gera ein lukt sum øllum dámar. Tað sum nøkur halda vera ein góðan lukt, vilja onnur ikki vita av, sigur leiðarin í Audi luktbólkinum.

So vita tað, at lukturin í einum nýggjum bili ikki altíð er ein blandingur av luktunum í tí ymiska tilfarinum, ið bilurin er gjørdur av.

# ítróttur

Nr. 184 • hósdagur • 26. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Havnar Svimjifelag gjørt sponsoravtalu



*Avtalan er undirskrivað. Per Jacobsen og Hans A. Joensen heilsast. Aftanfyri Røkur í Jákupsstovu, venjari, saman við Jóannes á Fløtti og Elisabeth Rasmussen*

**Í tvey ár hevur Suðuroyar Sparikassi verið høvuðssponsorur hjá Havnar Svimjifelag, og fríggjadagin 20. september varð sponsoravtalan teirra millum endurnýggjað at galda í tvey ár afturat.**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Havnar Svimjifelag er einasta aktiva svimjifelag í Streymoynni, so fólkagrundarlagið er stórt. Tí er tað eisini eitt stórt felag, sum nú hevur úti við 600 íðkandi limir.

Virksemið hjá svimjifelagnum er bæði at læra børn at svimja og at venja børn og ung at svimja kapp. Kappast verður serliga innanlands, men av og á verður farið uttanlands at royna seg, og onkuntíð eru útlendskir svimjarar í Føroyum og kappast.

### Nógv skal til

Nógv orka skal til at hava so stórt virksemi, og brúk er fyri útbúnum høvuðsvenjara og kønum hjálparvenjarum.

Aðalmálið í føroyskum svimjifeløgum er tvíeggjað: vit skulu bæði hava breidd og topp í svimjiítróttinum. Í einum oyggjalandi er umráðandi, at øll duga at svimja, og at nógv duga væl at svimja. Tað er meir enn so komið fyri, at svimjarar, sum hava vant í svimjifelag, hava bjargað fólki frá at drukna.

Onkur heldur, at svimjing ikki kann vera nøkur sosial ítróttargrein. Men so er ikki. Vinarlagið millum svimjarar er av tí besta, og ítróttarandin er fyrimyndarligur.

Hans A. Djurhuus, formaður í Havnar Svimjifelag, fegnast um, at ábyrgdarfólk í Suðuroyar Sparikassa síggja, hvussu stóran týdning ungómsarbeiði innan ítrótt og ikki minst svimjing hevur fyri samfelagið, og tí hava valt at endurnýggja avtaluna sum høvuðssponsorur hjá Havnar Svimjifelag. Hann ivast ikki í, at hetta eisini kemur vinnulívinum til góðar í longdini.

Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa, sigur, at Havnar Svimjifelag er eitt stórt og seriøst felag, og svimjing er ein fólkaítróttur. Tí hava vit gjørt hesa avtaluna.

# Vinnarin funnin



*Seðilin hjá Anithu, sum tryggjaði henni eina ókeypis fótbóltsferð til Týsklands*

**Tað gjørdist Ása Mortensen úr Havn, sum vann ferðina við landsliðnum til Týskland**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jáukp Mørk*

Í serútgávuni, Fótbóltur 2002, hevði Sosialurin saman við Atlantic Airways skipað fyri eini kapping, har tað var møguligt at vinna eina ferð til stórdystin hjá føroyska landsliðnum ímóti Týsklandi. Av ymsum orsøkum hevur kappingin tíverri verið seinkað nakað, men nú er so drigið, og í dag kunnu vit so boða frá, at vinnarin av ferðini er Anitha Mortensen, sum býr á Mikkjalstrøð í Havn.

Sum kunnugt, so er tað tann 16, oktober, at dysturin móti Týsklandi skal spælast, og umframt Anithu verða væntandi hópur av øðrum føroyingum við. Sostatt hevur Atlantic Airways selt mest sum allar sínar ferðaseðlar til dystin, umframt at fleiri aðrir ferðafyriskiparar skipa fyri ferðum, so tað verður helst ikki stuðul frá áskoðaraplássunum, sum føroyska landsliðið fer at sakna í Hannover.

Sosialurin og Atlantic Airways vilja samstundis nýta høvið til at ynskja Anithu tillukku við vinninginum.